# Grønland bíðar við EFTA

**Grønlendski landsstýrisformaðurin hevði bestan hug at tosa um samstarv millum Føroyar og Grønland enn nakran grønlendskan EFTA limaskap**

RÌKISFUNDUR
*Heri á Røgvi/*
*Páll Holm Johannesen*

**Leynar:** Lagið var sum heild gott á ríkisfundinum mánadagin í hugnaliga umhvørvinum í Leynum. Ikki minst grønlendski landsstýrisformaðurin, Hans Enoksen, var í góðum hýri.

Hann fekk bert ein spurning á tíðindafundinum í summarhúsinum í Leynum. Hann snúði seg ikki óvæntað um, hvørt Grønland hevur í hyggju at søkja um limaskap í EFTA.

Hans Enoksen greiddi umvegis tólk frá, at Grønland í løtuni hevur gott samstarv við bæði EFTA og ES, og ongar ætlanir eru um at søkja limaskap í EFTA.

### Løgmaður til Grønlands

Hans Enoksen gjørdi eisini greitt, at hann hevur boðið Jóannes Eidesgaard, løgmanni, á vitjan í Grønlandi. Hetta helt Hans Enoksen vera eitt gott høvi at økja um samstarvið millum Føroyar og Grønland, sum hava eina ørgrynnu av málum til felags, helt hann fyri.

– Løgmaður skal bara siga, nær hann kann koma. Vit eru altíð klárir, sigur Hans Enoksen.

Løgmaður tók undir við partamanninum í Grønlandi um, at tað er nógv, Føroyar og Grønland kunnu samstarva um. Løgmaður ætlar sær eisini til Grønlands, men tað er í løtuni óvist, nær tað verður.

# Føroyskur EFTA-lima

**Fleiri tekniskar og løgfrøðiligar forðingar skulu fáast av vegnum, áðrenn Føroyar kunnu søkja um limaskap í EFTA. Hetta gjørdi danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, greitt á ríkisfundinum mánadagin**

RÍKISFUNDUR
*Heri á Rógvi/*
*Páll Holm Johannesen*

**Leynar:**
Ætlanin hjá landsstýrinum um at søkja um limaskap í EFTA hevur – fyribils – fingið eitt skot fyri bógvin. Hetta er greitt eftir ríkisfundin millum Anders Fogh Rasmussen, Hans Enoksen og Jóannes Eidesgaard fyrrapartin mánadagin.

Spurningurin um føroyskan EFTA-limaskap var eitt av evnunum á tveir tíma langa ríkisfundinum í Leynum.

Hóast danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, sigur seg vera positivt sinnaðan til at kanna møguleikan fyri føroyskum limaskapi í EFTA, metir hann kortini, at ávísar forðingar skulu beinast av vegnum, áðrenn ein umsókn úr Føroyum kann latast EFTA.

### Løgfrøðiligar forðingar

Á tíðindafundinum stutt fyri døgurða varð danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, spurdur, hvørja støðu danska stjórnin hevði til føroyskan limaskap í EFTA.

– Nýggja heimildarlógin leggur upp til, at Føroyar hava møguleika at søkja um limaskap í altjóða felagsskapum, sum samstarva um málsøki, sum Føroyar frammanundan hava yvirtikið. EFTA fevnir rættiliga breitt, og fleiri av samstarvsøkjunum eru øki, sum ikki eru yvirtikin av føroysku myndugleikunum. Áðrenn Føroyar kunnu søkja um limaskap er neyðugt at beina hesar løgfrøðiligu og teknisku forðingarnar av vegnum, svaraði Anders Fogh Rasmussen,

Millum løgfrøðiligu og teknisku forðingarnar, ið Anders Fogh Rasmussen sipar til eru millum annað ársroknskaparlógin, loftferðsla og fíggjarmál. Hetta eru mál, sum limalondini í EFTA, Ísland, Sveis, Noreg og Liktenstein, samstarva um, men sum ikki eru undir fullum føroyskum málsræði, men framvegis eru undir donsk málsøki.

Er tað ikki í roynd og veru bert ein spurningur um, hvat limalondini í EFTA vilja? Prógvar føroyski limaskapurin í NAMCO ikki, at tað er viljin hjá limalondunum, sum vigar meira enn løgfrøðin?

– Vit eru noyddir at halda okkum til heimildarlógina. Men tað er rætt, at tað eru limalondini í EFTA, sum í síðsta enda avgera, hvønn tey vilja hava sum lim, svarar Anders Fogh Rasmussen.

Spurdur hvørjar ítøkiligar fyrimunir, forsætisráðharrin sá í einum føroyskum limaskapi í EFTA, svaraði Anders Fogh Rasmussen:

– Talan vil fyrst og fremst verða um handilsligar fyrimunir. Við EFTA limaskapi vil Føroyar eisini fáa eitt tættari politiskt og búskaparligt samstarv til onnur lond. Ikki minst vil ein limaskapur vísa at Føroyar vilja geva sítt íkast til alheimsgerðingina, tí stórur partur av alheimsgerðingini fer fram í altjóða felagsskapum.

### Tosa við limalondini

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, ásannaði eisini á tíðindafundinum, at ávísar løgfrøðiligar og tekniskar forðingar mugu beinast av vegnum, áðrenn Føroyar kunnu søkja um limaskap í EFTA. Hann dugdi kortini ikki ítøkiliga at síga, hvussu lang tíð fer at ganga, áðrenn løgfrøðiligu og tekniska forðingar verða beindar av vegnum.

– Vit fara alt fyri eitt undir at kanna, hvussu vit kunnu loysa hesar teknisku og løgfrøðiligu forðingar, tí landsstýrið hevur gjørt greitt, at vit vilja skjótast gjørligt søkja um limaskap. Vit fara eisini í næstum at seta okkum í samband við hini limalondini í EFTA fyri at fáa greiðu á, hvørja støðu tey hava til føroyskan limaskap, sigur Jóannes Eidesgaard.



F. v.: Anders Fogh Rasmussen, Jóannes Eidesgaard og Hans Enoksen

# Fogh stendur við sítt

**Danski forsætisráðharrin vil ikki hoyra talan um, at hvørki drotningin ella nýggja ríkisumboðið hava úttalað seg skeivt**

RÌKISFUNDUR
*Heri á Rógvi/*
*Páll Holm Johannesen*

**Leynar:** Hann var hvørki til at høgga ella stinga í.

Líkamikið hvat vit so royndu, so stóð Anders Fogh Rasmussen við sítt. Hann stuðlar bæði røðuni hjá drotningini á Føroya vitjanini og útsagnunum hjá nýggja ríkisumboðnum fullkomiliga. Hvørki ríkisumboð ella drotning hava gjørt nakað skeivt, og sambandið millum Føroyar og Danmark er betri enn nakrantíð, um vit skulu trúgva danska forsætisráðharranum.

– Um taluna hjá drotningini er bara tað at siga, at hon vísir til fakta: Tað, at tað er viðtikið ein yvirtøkulóg. Tað er ikki gera málið politiskt. Eg haldi tað vera hóskandi, at tá ið drotningin er í Føroyum tosar hon um mál, sum eru frammi,